VALGREINAR

Vælvirkandi vinnulív stimbrar

Sverri Midjord

Fyri at komandi ættarlið skal trívast, vilja vit sum g anga undan, geva teimum ein arv, sum tey kunnu byggja víðari á. Javnaðarflokkurin arbeiðir fyri, at tað skulu vera somu møguleikar hjá øllum, sum hava hug at stova ymiskt virksemi runt landið, tí Føroyar er og skal vera fyri øll.

Eitt vælvirkandi vinnulív hevur við sær, at annað virksemi eisini kemur at trívast.

Nevnast kunnu m.a. ítróttur, tónleikalív og annað frítíðarvirksemi.

Fleiri eru tey, ið hava byrjað sum amatørar her heima, sum síðani eru komin víðari sum professionell ítróttafólk og tónlistafólk. Men enn fleiri eru tey, sum ikki fingu møguleikan at koma víðari á teirra øki. Orsøkin hevur fyri tað mesta verið, at umstøðurnar hava ikki verið nóg góðar her heima í Føroyum.

Vit eru vælsignað við nógvum góðum tónleikarum, sangarum og ítróttarfólki, har fleiri eru kend uttanfyri landoddarnar.

Javnaðarflokkurin vil arbeiða fyri, at møguleikarnir gerast betri hjá teimum, sum vilja royna seg á hesum økjum.

Tann einasti vegurin

Hjalmar Jóhan Juul
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Tann einasti vegurin til fult sjálvbjargni er við Sjálvstýrisflokkinum við róri, Tjóveldi boðar frá at teir hava eitt ordans lokomotiv, hetta lokomotivi man nok eita sjálvstýri, tíð her atlar Høgni Hoydal at samla allar tær føroysku sjálvstýriskreftirnar. Men her hevur han ein stóran trupuleika at Tjóveldi hevur ein skipara lærdan, men han liggur enn á onkrum flúri yvuri í Norra kystini vit hoyra okkurt brøli og meiri hendur ikki, men miss ikki móti vit hava eisini onkran skipara í okkara flokki, so lat okkum bara taka yvur, tí vit eru teir einastu sum kenna til hesa farleið eftir miðuni við beinari kós móti fullum sjálvstýri og sjálvbjargni, vit eru teir einastu sum kunna samla sjálvstýriskreftirnar í Føroyum.

So veljarar fari á væl tann 20. januar og seti ein sterkan SJÁLVSTÝRISFLOKK á ting, lat tann 20. Januar verða ein D-dag so tað rungar í.

Gott Sjálvstýrisvæl øll somul.

Tí stilli eg upp fyri Javnaðarflokkin

– tryggur politikkur á sjálvbjargnisleið

Helena Dam á Neystabø
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Sjálvstýristilgongd føroyinga má ikki klúgva tjóðina í helvt - men hon má heldur ikki steðga upp. So stutt kann tað sigast, og tí er neyðugt at finna eina semju, sum ikki avmarkar sjálvsavgerðarrætt føroyinga.

Flest øll eru samd um, at viljin til at klára seg sjálvan er ein drívmegi, ið fær bæði einstaklingar og samfeløg at bróta upp úr nýggjum og at skapa virðir burturúr tilfeingi, sum eingin fyrr hevði hugsað um. Hesum hava vit brúk fyri í dag.

Tað svitast heldur ikki, at eitt samstarv á jøvnum føti millum Føroyar og Danmark er nógv betri enn eitt samstarv, har Danmark hevur evsta vald í Føroyum á týðandi økjum.

Tíverri hevur tað ikki eydnast hesi seinastu 6 árini at finna ein leist, sum føroyingar kunnu semjast um.

Javnaðarflokkurin hevur eins og aðrir flokkar ásannað, "at heimastýrisskipanin avmarkar heimildir og virkisføri hjá føroyskum myndugleikum, og hon elvir til ógreiðu í valds- og ábyrgdarbýtinum millum føroyskar og danskar myndugleikar". Javnaðarflokkurin hevur tí orðað eitt uppskot til eina sjálvstýrislóg, sum kann vera grundarlag undir einari tjóðskaparligari semju um framtíðarstøðu Føroya.

Í stuttum er uppskotið til sjálvstýrislóg Javnaðarfloksins:

At vit áseta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í einum sjálvstýrissáttmála sum ein politiskan sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond, ið viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum felagsskapi - ríkisfelagsskapi, samveldi ella frælsum felagsskapi. Hesin sáttmáli avmarkar ikki sjálvsavgerðarrætt føroyinga frameftir.

Verður sjálvstýrismálið lagt á hillina nú, kemur tað framhaldandi at klúgva tjóðina í tvey.

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum er eitt haldgott grundarlag undir teirri tjóðskaparligu semjuni, sum tey allarflestu leingjast eftir.

Miðflokkurin ein fullveldisflokkur

Jaspur Vang
Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Føroyski veljarin skal minnast til, at Miðflokkurin - uttan mun til, hvussu flokkurin nú roynir at snúgva sær uttan um fullveldiskjakið og førda búskaparpolitikkin - var ein fortreyt fyri, at seinasta fullveldissamgongan varð skipað. Tí hevur flokkurin fulla ábyrgd av førda búskaparpolitikkinum og fullveldistilgongdini.

Nú løgtingsval er fyri durum førur Miðflokkurin seg fram sum ein kristiligan flokk á miðjuni í føroyskum politikki. Formaðurin í flokkinum er endurgivin fyri at siga, "at ríkis-rættarliga støðan ikki er avgerandi fyri flokkin". Í og við at ríkisrættaliga støða Føroya og búskaparpolitikkur í Føroyum ikki kunnu skiljast at, eins og hesi viðurskifti eru altavgerðandi fyri trivna, vælferð og framburð í Føroyum, er tað ógvuliga undrunarvert, at ein politiskur flokkur í Føroyum ikki heldur ríkisrættarligu støðu Føroya og búskaparpolitikk vera avgerðandi í sínum politiska virksemi. Spurningurin er tí, hvat Miðflokkurin veruliga vil í føroyskum politikki.

Lítil flokkur við stórum valdi

Miðflokkurin vísir á, at hann taktiskt hevur lagt seg væl fyri á miðjuni í føroyskum politikki og hevur flokkurin tí - eins og Sjálvstýrisflokkurin - lutfalsliga stórt politiskt vald í mun til undirtøkuna millum veljararnar. Henda staðfesting saman við vingluti støðutakan floksins í eitt nú málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya, kann ikki skyljast øðrvísi, enn ein greið útmelding um, at Miðflokkurin ikki virðir fólkaræðið meira enn so, at hann politiskt er til sølu til hægstbjóðandi.

Fullveldisflokkur

Flokkurin hevur tikið undir við førda yvirtøkupolitikkinum og tí førda búskaparpolitikkinum. Nú val er útskrivað, er tað ov seint og ikki sørt ómoralskt at skifta ham.

Uttan Miðflokkin var eingin fullveldissamgonga skipa. Jú sanniliga hevur hesin flokkur havt stórt vald, eins og hann er komin á figgjarlógina - men spurningurin er, hvussu - og á hvønn hátt flokkurin vil nýta nývunnu figgjarorkuna og valdið ?

Uttan eina greiða politiska støðutakan á ríkisrættarliga - og búskaparliga økinum, hevur ein politiskur flokkur einki trúvirði.

Vónandi minnist veljarin tann 20. januar at Miðflokkurin er ein full-veldisflokkur.

Skammiligt met at eiga

Heðin Mortensen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Enn eina ferð hava vit fingið staðfest, at Føroyar hava hægsta skattatrýst í Europa, samstundis sum lítið man vera at ivast í, at vit á hesum øki eru í nánd av einum heimsmeti.

Ein kanning herfyri staðfesti, at vit eru langt aftan fyri restina av Europa, har miðalskatturin av 250.000 inntøkukrónum er 19,5 prosent, meðan hann hjá okkum er oman fyri 40 prosent!

Hetta er veruliga ikki nakað, vit kunnu liva við, tí tað kann ikki vera meiningin, at landskassin skal ganga undan í at taka allan arbeiðshug frá fólki.

Sambandsflokkurin hevur sett sær fyri at broyta hesi viðurskifti, so tað skal loysa seg at arbeiða meira, tí tað er hóast alt arbeiði og arbeiðssemi, vit øll somul skulu liva av.

Sum er, sendir tað almenna út eitt signal um, at vit skulu arbeiða sum minst, tí skatturin av eyka arbeiði er helt uppi á 60 prosentum. Hetta er órímiligt, og Sambandsflokkurin vil hava hetta tal niður á 40 prosent.

Eisini er skatturin á arbeiðsinntøkum ov høgur, so eisini har er neyðugt við broytingum, tí nógv at hesum skyldast fjaldar og innbygdar skattahækkingar, ið eiga at verða beindar burtur.

Undir valstríðnum hava mong valevni tosað um henda alt ov høga skattin, men tað er bara Sambandsflokkurin, ið hevur spælt út við, at nakað skal gerast við málið.

Tí er valið í grundini so sera einfalt: Vilt tú hava skil á hesi viðurskifti, mást tú taka undir við Sambandsflokkinum!

VALGREINAR

Fólkapensión og arbeiði

Kristian Eli Zachariasen
valevni Sjálvsstýrisfloksins í Norðoyggjum

Fleiri fólk eru í bestum árum og annars væl fyri, tá ið pensiónsaldurin er um at vera náddur. Aloftast er ringt at leggja árar inn í besta aldri, og mugu vit ásanna, at als fleiri velja at arbeiða víðari aftaná pensiónsaldurin.

Hevur man í dag valt hesa leið, ber til hjá einum fólkapensiónisti at vinna sær 44.000 krónur, uttan tað fær ávirkan á fólkapensiónina.

Men, er inntøkan meira enn 44.000 krónur, verður fólkapensiónin skerd, ímun til tað, ið ein vinnur sær meira enn hesar 44.000 krónurnar.

Hetta er ikki ein gongd leið. Vit eiga at eggja teimum eldru, ið hava hug til at arbeiða meira og vinna sær nakað av peningi afturat, til at gera tað. Tað er óiva fleiri, ið kanska setast aftur av tí ásetta loftinum. Tískil má hetta broytast.

Sjálvstýrisflokkurin vil arbeiða ímóti, at eitt hægri loft verður ásett, ella í betri føri, at loftið uppá 44.000 krónur verður avtikið og at øll inntøka við síðuna av fólkapensiónini verður skatta sum vanlig inntøka, uttan tað fær nakra ávirkan á fólkapensiónina.

Alt gýtingarøkið í Vágahavinum eigur at friðast

Jóanis Nielsen
valevni Fólkafloksins í Vágum

Síðani friðingin í Vágahavinum bleiv verðuleiki, so er nógv broytt hjá útróðrarmonnum í Vágum, hjá sandingum og hjá hestmonnum.

Nú er aftur lønandi at fiska við snellu í Vágahavinum. Men av tí at tær innastu leiðirnar av gýtingarøkinum, ikki vóru tiknar við í friðingini, so verður nógv tosað um, at rættast hevði verið at alt gýtingarøkið kom undir friðingina, tað hava útróðrarmenn í Vágum fleiri ferðir víst á, sjálvt um teir eru sera fegnir um tær ábøtir Fólkaflokkurin gjørdi, fyri at fáa friðað partar av Vágahavinum.

Sum nú er, seta stórir línubátar nógva línu innan fyri friðaðu gýtingar-leiðirnar, ja, heilt í klettin - inn á alla smábátaleiðina hjá hestmonnum, sandingum og vágamonnum.

Fáa vit aftur møguleikan, so skal arbeiðast fyri at fáa friðingarøkið at fevna um alt gýtingarøkið.

Vel Fólkaflokkin, hann umboðar tykkum best.

Gott val.

Viðmerking til Dan – (og Tobba)

Jógvan á Lakjuni
tingmaður og valevni Fólkafloksins í Eysturoy

Í sjónvarpssendingini í kvøld, 8. jan., nú fokus varð sett á alivinnuna og Eysturoynna, fekk eg ikki høvi at svara Dan R. Petersen aftur, tá ið hann bara hevði hug at lasta samgonguni og Bjarna Djurholm fyri atgerðaloysi o.s.fr.

Eingin orsøk er hjá mær at verja Bjarna Djurholm og Vinnumálaráðið, men eg fari heldur at vísa til tað, sum Gullbrand Olsen í Gøtu segði í innslagnum. Her var ein skilamaður, sum visti, hvat hann tosaði um. Ikki eitt negativt orð, men ein realistisk lýsing av trupulleikunum - eingin atfinning at nøkrum, men eitt sterkt ynski um, at streymurin fór at venda, so alivinnuni verður lív lagað.

Tað er altíð lætt at vera eftirsnarur, og ivaleyst kundi okkurt verið gjørt betur - bæði í vinnuni sjálvari og hjá myndugleikunum.

Men ikki minnist eg, at Javnaðarflokkurin hevur gjørt nakað í tinginum fyri at hjálpa alivinnuni, nú hon er í svárari neyð!

Tórbjørn legði eisini á Vinnumálaráðið og Bjarna. Men honum tími eg als ikki at svara aftur. Hann hevur fingið sær til sport at leggja eftir fólkafloksmonnum - og hann megnaði eisini at slíta sjálvstýrissamgonguna. - Spell var tað!

Okkara tjóðarfrælsi verður ikki »respekterað« av dønum

Jónfinn Olsen
valevni hjá Miðfloksins í Suðurstreymoy

So upplivdu vit tað, allir Føroyingar, at danska fólkatingið ikki virðir ("respekterar") Føroyskan sjálvsavgerðarrætt og eitt Føroyskt Tjóðarfrælsi.

Við at seta Danskar hernaðarlógir í gildi í Føroyum "uttan at spyrja?" og uttan síðan at virða ("respektera"), at Føroya Løgting ikki ynskir hesar lógir settar í gildið í Føroyum. "Makan til frekleika kundi man sagt"?

Her siggja vit, hvussu lítla virðing ("respekt") danska Fólkatingið hevur yvir fyri Føroyum og Føroyingum. Føroyingar hava onki vald í Føroyum í dag, tá alt kemur til alt, og tað meti eg, vera sera óheppið fyri Tjóðina Føroyar og okkum sum Føroyingar.

1. Vit eiga sum skjótast at fáa eina figgjarliga uppgerð gjørda millum Føroyar og Danmark?
2. Siggja hvat hendan uppgerð í verðuleikanum vil vísa okkum?
3. Síðan eiga vit at taka støðu til, hvat vit skula gera, verða í ella uttan fyri ríkisfelagskapin?

(Hetta skal sjálvsagt avgerast við at fólkið sleppur at tala á tann hátt at málið verður koyrt út til fólkaatkvøðu.)

Hesi ting eiga sum skjótast at verða fingin uppá pláss, tí slíkt sum Danska Fólkatingið hevur víst í hesi gerð, eiga vit ikki at lata okkum linda. Eitt er at "acceptera" og eitt annað er at "respektera".

At man ikki "accepterar" er eitt, men at man ikki "respekterar" ein annan part, kann ikki góðtakast. Tí at "respektera" ein annan part eigur man altíð at gera, lat ongan iva vera um tað, nakrantíð.

"Lat okkum Føroyingar ongantíð ov skjótt fáa ein Tjóðarfrælsispolitikk fyri Føroyar at virka, áðrenn vit heilt missa tamarhaldið av donskum "respektleysum" avgerðarrætti í Føroyum".

Vel tína røddi inn á Løgting, vel MIÐFLOKKIN.

Gott val

Er Selatrað gloymd?

Rúni Poulsen
Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy



Líka fram til 1976 var Selatrað ein týdningarmikil bygd í Føroya landi, Selatrað bant Streymoy og Eysturoy saman. Sundaferjan førdi mangan bilin og mangt fólki yvirum til Hósvíkar, men so tá brúgvin og tunnilin kom so var hetta kapittul yvirstaðið. Selatrað er í dag ein meira gloymd bygd, við einum tí vánaligasta og mest vandamikla vegstrekkinum í landinum. Skúlin í bygdina er niðurlagdur, so skúlabørn á Selatrað mugu hvønn morgun gjøgnum hetta vandamikla strekkið út á Strendur í skúla. Um veturin fer eitt ótal av bilum útav á hesum strekki, persónbilar, mjólkarbilar og oljubilar, nær verður vegurin breiðkaður? Kanska tá skúlabussurin er farin út av og trý ella fýra børn hava fingið skaða ella ta sum verri er. Hetta er ein afturvendandi spurningur fyri nógvar av teimum smærri bygdunum í Eysturoynni. Situr tann persónurin sum hevur skrivað hetta brævið á tingi eftir 20. januar, so verða hesi vandamiklu bygdastrekki raðfest væl hægri enn undirsjóvar tunlar.

Gott val.

Endurnýggja Sjúkrakassan

John Johannessen
Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi



Tíðin er farin frá gomlu sjúkrakassunum. Málið er ein sjúkratrygging, sum umfatar øll og verður goldin yvir skattin.

Sjúkrakassagjaldið er ein gomul, ótíðarhóskandi skipan. Ein skipan, sum nærum ongan heilsupolitikk hevur knýttan at sær.

Tað er neyðugt við einari nýggjari skipan. Einari sjúkratrygging, sum umfatar øll og verður goldin yvir skattin. Sjúkratryggingin skal ikki bara rinda fyri læknavitjan og heilivág, eins og sjúkrakassin. Sjúkratryggingin skal eisini átaka sær aðrar uppgávur, millum annað at raðfesta heilsupolitikk, fyribyrging og upplýsing.

Einfaldari umsiting

Tað eru í dag 11 sjúkrakassar í landinum. Hvør teirra hevur eitt ella tvey fólk til umsiting. Ein nýggj sjúkratrygging hevði í mesta lagi havt 7 fólk í starvi. Kanska færri.

Skal sjúkratryggingin gjaldast yvir skattin, kostar hetta umleið 80 milliónir krónur eyka á figgjarlógini.

Tað hava vit ikki ráð til í løtuni. Men til ber kortini at byrja at broyta skipanina. Tað ber til at samskipa teir 11 sjúkrakassarnar í eina sjúkratrygging, sum í fyrstu atløgu verður goldin við einum felags limagjaldi, á sama hátt, sum í dag.

Hetta verður ikki dýrari fyri borgaran. Heldur øvugt. Og so gevur tað eina einfaldari skipan, sum eisini kann átaka sær uppgávur innan heilsupolitikk, í staðin fyri bert at gjalda fyri glasið av heilivági.

Endaliga málið má korini vera at fáa eina sjúkratrygging, sum verður goldin yvir skattin, og sum umfatar øll.